Sosialurin





*»Eg vil ikki siga, at tað er mangul upp á innovatión (í føroyskum vinnulívi, blaðm.), men eg vil heldur siga, at tað ongantíð er ov nógv av tí.«*

Marita Rasmussen

# Vilja skapa stoltleika í vinnuni

**Kalendarin hjá Maritu Rasmussen og Esther Dahl er fyltur á tamb í hesum døgum. Tær eru ávikavist stjóri og verkætlanarleiðari í Vinnuhúsinum, sum fyri áttandu ferð skipar fyri Vinnudegnum. Sosialurin hevur hitt tær og spurt, hví temavalið fall á »innovatión« hesuferð.**

SAMRØÐA
*Hilmar Simonsen*
*hilmar@sosialurin.fo*

Tað hevur ofta verið tikið til, at verkætlanir uttan stert hava lítlan kjans at yvirliva í Føroyum.

## Stutt um Vinnudagin

**Hetta er áttanda árið á rað, at Vinnudagurin verður hildin. Líka síðani byrjan hevur undirtøkan verið góð, at kalla fult Norðurlandahús hvørja ferð. Tað eru nógvir kandidatar til ársins virki og ársins átak á hvørjum ári. Ein dómsnevnd, sum er óheft av Vinnuhúsinum, kjósar vinnararnar. Í kjósanini av »Ársins virki« verður høvuðsdentur lagdur á, at virkið koyrir væl fíggjarliga, tað vil siga kann vísa góð úrslit ár undan ári, er støðugt og annars væl etablerað. Í kjósanini av »Ársins átaki« verður ikki hugt so nógv eftir tí fíggjarliga partinum, men meiri at um »átakið« hevur verið við til at víðka um vinnuliga sjónarringin.**

Hesin tankin rennur mær til hugs, tá eg seti kósina niðan til Vinnuhúsið, sum heldur til í einum sera stásiligum húsum uppi á høvdini í Smærugøtu í Havn. Man tað vera hetta, sipað verður til, tá evnið á Vinnudegnum hesuferð er »nýskapan, menning og nýhugsan«?

Ikki tí, okkara høvuðsvinna, fiskivinnan, er í sjálvum sær ein máttmikil vinna, sum eisini kastar nógvar avleiddar vinnur av sær. Til dømis fiskivinnu á landi, skipasmíð, umframt veitingar- og tænastuvinnur av alskyns sløgum. Hartil kemur alivinnan, sum er eitt gott alternativ til fiskivinnuna. Men rætt er tað, at alt hetta hevur okkurt við stert at gera – antin so ella so.

## Vinnudagurin við til at skapa innovatión

Komin niðan til Vinnuhúsið hitti eg stjóran, Maritu Rasmussen, og verkætlanarleiðaran Esther Dahl, sum eru so beinasamar at greiða frá um Vinnudagin.

Endamálið við vinnudegnum er at geva vinnuni íblástur, og at geva teimum fyritøkum, sum klára seg væl, eitt herðaklapp. Vinnufólk møtast í hátíðarligum kørmum í Norðurlandahúsinum við fyrilestrum, sum gjarna skulu geva vinnuni íblástur og lata hana súgva til sín. Endamálið við tiltakinum er eisini at skapa stoltleika í vinnuni yvir rokkin úrslit. Annars er hetta eitt kravleyst forum, og vit vænta ikki nakað afturfyri frá vinnuni, greiðir Marita Rasmussen frá og leggur afturat, at Vinnudagurin í sær sjálvum helst skal vera við til at skapa innovatión.

Tey fyrstu árini, Vinnudagurin varð hildin, var einki ávíst tema fyri tiltakið, men hetta er síðani broytt, so at nú er eitt nýtt tema hvørja ferð. At valið fall á innovatión hesuferð hevur sambært Maritu Rasmussen og Esther Dahl ikki nakra serliga orsøk aðra enn, at evnið hevur verið nógv umrøtt í seinastuni, og at





*Maritu Rasmussen og Esther Dahl*

tað altíð er ein týðandi táttur fyri vinnuna at vera kappingarfør á altjóða marknaðinum. Eg spyrji kortini tær báðar, um tær halda tað vera mangul upp á innovatión – nýskapan, menning og nýhugsan – í føroyskum vinnulívi.

Eg vil ikki siga, at tað er mangul upp á tað, men eg vil heldur siga, at tað ongantíð er ov nógv av tí. Vinnudagurin er frameftirlítandi, ikki afturlítandi. Íverksetan er eitt rímuliga ítøkiligt hugtak, meðan innovatión er minni ítøkiligt, men hendir hvønn dag í størri ella minni mun. Finnur ein fyritøka til dømis út av at broyta framleiðsluna til onkran fyrimun, so er talan um innovatión. Innovatión nýtist ikki at vera nakað risastórt, til dømis er produktmenning eisini innovatión, heldur Marita Rasmussen fyri.

Eg havi ikki hug at sleppa hesum evninum heilt enn, so eg spyrji Esther Dahl, um hon heldur, at vinnulívið hevur dugað nóg væl at endurnýggja seg?

Í seinastuni eru fleiri fyritøkur komnar, sum ikki framleiða tær sonevndu »traditionellu« vørurnar. Tað eru handverkarafyritøkur, veitingarfyritøkur, og tænastufyritøkur av ymsum slag. Her er serliga talan um vinnur, sum veita nýskapandi tøkni og tænastur til verandi høvuðsvinnu, fiskivinnuna, og harvið ger hana meiri dugnaliga. Tað merkir, at vinnan endurnýggjar seg alla tíðina við millum annað at taka nýggja tøkni til sín, sigur Esther Dahl.

## Bæði tørvur á herming og gransking

Veitingar- og tænastufyritøkurnar, sum Esther sipar til, finnast bæði í Føroyum og aðrastaðni, men ein av teimum stóru av hesum fyritøkunum er íslendska Marell, sum varð stovnað av íslendsum universitetslesandi. Her heima byrjaði onkur lesandi á Fróðskaparsetrinum saman við øðrum fyri fáum árum síðani at framleiða eina orkusparandi skipan til skip og bátar. Og hetta er ein gongd, sum teimum í Vinnuhúsinum líka væl.

Tað er alt avgerandi at fjálga um útbúgving og gransking, men her eru vit ikki nóg væl við enn. Vit brúka nógv minni pening til gransking og menning enn okkara grannalond gera. Meðan eitt land sum Finnland brúkar umleið 3 prosent av bruttotjóðarútøkuni (BTÚ), so brúka vit bert umleið 1 prosent. Tó skal leggjast afturat, at vinnulívið í okkara grannalondum rindar ein stóran part av vinnuligu granskingini, men hetta letur seg ikki eins væl gera í Føroyum, tí at føroysku fyritøkurnar eru ov smáar. Taka vit eina stóra føroyska fyritøku, so svarar hon kanska til eina miðalstóra útlendska fyritøku, siga Marita Rasmussen og Esther Dahl.

So út frá hesum skilst, at smáu føroysku fyritøkurnar hava illa ráð til at granska og menna, men hvat er so til at taka? Givið er, at summar fyritøkur duga væl at »avrita« tað, sum aðrar fyritøkur finna upp á, og tað halda Marita og Esther vera í fínasta lagi í ein ávísan mun. Tað kann serliga loysa seg væl hjá teimum smærri fyritøkunum.

Nógvar smáar fyritøkur duga væl at umstilla sína framleiðslu, so hon samsvarar teirri vitan, sum onnur hava granskað í. Vit hava tørv á báðum tveimum: at »herma« og at finna upp á sjálvi, vísa tær á.

Eitt er at herma, men vit kunnu ikki bara liva av at herma, eru tær samdar í, tað er alneyðugt við meiri gransking og menning her á landi.

Frá almennari síðu átti at verið gjørt meiri fyri at ment tær hægru útbúgvingarnar, og her hugsa vit serliga um tær náttúruvísindaligu útbúgvingarnar. Vitan er ein fortreyt fyri nýskapan, og hartil vil eitt virkið lestrar- og granskingarumhvørvi hava nógv positiv ringárin við sær. Tað er ein stórur trupulleiki, at vit missa so nógv ung og dugnalig fólk av landinum, tí tey ikki fáa avbjóðingar her heima. Tí hevði verið ynskiligt, um vit fingu væl fleiri útbúgvingartilboð, um ikki annað so møguleikar fyri at taka ein størri part av teimum hægri útbúgvingunum í Føroyum, siga Marita Rasmussen og Esther Dahl.

## Fleiri patentumsóknir

Íløgufeløgini spæla ein stóran leiklut, tá tað kemur til at fremja nýggj hugskot í verki. Tey plaga at seta strong krøv, áðrenn tey veita fígging. Men tað eru ikki allir uppfinnarar, ið hava høga útbúgving. Tað finnast eisini »Georg Gearløsar« við lítlari og ongari útbúgving, sum eisini skulu sleppa at royna seg.

Tað kann vera talan um uppfinningarsom fólk, sum kanska ikki megna so væl tann organisatoriska partin, og her er neyðugt at hjálpa og stuðla. Her koma íløgufeløgini til sín rætt. Tey seta krøv til heildina, fyri at ein verkætlan kann vera burðardygg. Tey kunnu til dømis seta krøv um, hvussu nevndin í felagnum verður sett saman, greiða tær báðar frá.

Marita Rasmussen og Esther Dahl ivast ikki í, at vit koma at síggja nógvar góðar uppfinningar í framtíðini. Men eitt er at finna upp á, annað er at ogna sær patent upp uppfinningar.

Patentumsóknir er nakað, sum hevur vundið nógv upp á seg í seinastuni. Hetta kemur óivað í kjalarvørrinum av, at tað hevur elvt til stórar trupulleikar hjá summum, at patentini ikki hava verið í lagi. Fleiri eru sikkurt ávarað av søguni um lemmavirkið í Vági. Eru patentini upp á pláss, so er óivað lættari at fáa fígging, siga tær.